## Barnahúsið Margit 1 ár

15. september í fjør lat Barnahúsið Margit dyrnar upp fyri børnum í ansingarskipanini hjá Klaksvíkar kommunu. Barnahúsið Margit var fyrsti barnagarður, ið Klaksvíkar kommuna hevur latið gjørt til endamálið. Hinir barnagarðarnir eru fyri tað mesta leigumál í gomlum bygningum. Borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen fegnaðist saman við starvsfólkum og børnum á føðingardegum. Trølla Pætur og Trølla Omman løgdu eisini leiðina framvið og børnini vóru sera glað fyri vitjanina.



# Sjey fakfeløg á álitisfólkaskeiði

**Hósdagin sótu umboð fyri sjey fakfeløg innan heilsuverkið saman á skeiði í Pálsstovu. Almanna-og heilsurøktarafelagið skipaði 11. september fyri álitisfólkaskeiði í Pálsstovu**

TÍÐINDASKRIV

Felagið valdi at bjóða hinum fakbólkunum við, sum húsast í Jákupsstovu, húsinum hjá Almanna- og heilsurøktarafelagnum. Feløgini valdu at taka av tilboðnum og sendu nakrar av sínum limum við á skeiðið. Soleiðis vóru luttakararnir á skeiðnum ljóðsmøður, fysioterapeutar, ergoterapeutar, bioanalytikarnar, Føroya psykiatrifelag og forkvinnan í heilsuhjálparafelagnum, umleið 40 fólk.

Undirvísari var Hans Trygvi Teirin, advokatur, ið greiddi frá fyri-sit-ingarlógini, sáttmálanum, starvsmannalógini og øðrum. Evni, ið viðkoma øllum fakfeløgunum.

- Vit halda, at tað er ógvuliga umráðandi at standa saman í fakfelagshøpi. Samanhald og samstarv smittar av á okkara dagliga starv. At stavsfólkið hevur góða sømdir, góðan stavsfólkapolitikk, at sáttmálarnir og annað verður yvirhildið ger, at starvsfólkið trívist og mennist til frama fyri dygdina á arbeiðsplássinum. Tað, at starvast tvørfakliga, er sera umráðandi, so at vit tilsaman kunnu geva borgaranum ta bestu viðgerð og røkt, sigur Jóhanna Køtlum forkvinna í Almanna-og heilsurøktarafelagnum, sigur Jóhanna Køtlum, forkvinna í Almanna- og heilsurøktarafelagnum.



# Norðurlendsk ráðstevna um bróstkrabba í Føroyum

**Komandi vikuskifti, 19. og 20. september, verður norðurlendsk ráðstevna fyri kvinnur, sum hava havt bróstkrabbamein. Tað er sjálvhjálparbólkurin Bót til Bata, sum skipar fyri**

RÁÐSTEVNA

*Tíðindaskriv*
*Føroya Felag Móti Krabbameini og Bót til Bata*



Ráðstevnan er fyrst og fremst ætlað kvinnum, sum hava havt bróstkrabba og sum arbeiða sum sjálvboðnir ráðgevarar hjá bólkinum Bót til Bata í Føroya Felag Móti Krabbameini. Talan er um eina afturvendandi norðurlendska ráðstevnu, sum verður hildin annað hvørt ár upp á skift í teim ymisku norðurlendsku londunum.

Hetta er fyrstu ferð, at ráðstevnan verður í Føroyum. Tað eru í ár 20 ár liðin, síðani bólkurin Bót til Bata varð stovnaður, og í tí sambandi hevur bólkurin valt at afturvendandi norðurlendska ráðstevnan skal vera í Føroyum. Bót til Bata er fyrsti bólkur, sum varð stovnaður í Føroya Felag Móti Krabbameini. Í dag virka 11 sjálvbodnar kvinnur í bólkinum, og á ráðstevnuni, sum verður hildin í Hotel Føroyum vera í alt 140 kvinnur úr Íslandi, Svøríki, Noregi, Danmark og Føroyum.

Bólkurin, Bót til Bata, var stovnaður í 1988, tí arbeiðið hjá Føroya Felag Móti Krabbameini vísti, at tørvur var á skipaðum sjálvhjálparárbeiðið. Hóast flestu kvinnur hugsa, at tær skulu sjálvar klára tað, tá tær eru skurðviðgjørdar fyri bróstkrabba, so taka nógvar av tilboðnum hjá Bót til Bata.

Sjálvboðnu ráðgevararnir í Bót til Bata hjálpa, stuðla og vegleiða kvinnum, sum koma í somu støðu, sum tær sjálvar hava verið í. Endamálið við bólkinum er eisini at fremja upplýsandi og vegleiðandi virksemi, at varpa ljós á bróstkrabba og um hvussu sjúkan kann fyribyrgjast og at savna inn pening til gransking av hesi sjúku. Eisini arbeiðir bólkurin fyri at bøta um viðurskiftini hjá hesum sjúklingabólki.

Endamálið við norðurlendsku ráðstevnuni er at geva sjálvboðnu ráðgevunum høvi at koma saman fyri at fáa íblástur frá hvørji aðrari. Eisini er undirvísing á skránni við góðum fyrilestrahaldarum. Tannseinna dagin - leygardag fyrrapart - hava heilsustarvsfólk møguleika at vera við, tí tá koma kendir serfrøðingar at greiða frá um nýggja viðgerð og røkt innan bróstkrabba.